# Fyllist í Fuglafirði

*Norðuri í Stovugerðinum er ein útstykking í gongd. Her verða 15 grundstykki tøk um stutta tíð*
*Mynd: Edvard Joensen*



**Seinastu útstykkingarnar í Fuglafirði eru ávegis. Neyðugt verður at fara út á Kambsdal, tí einki byggilendi er eftir í Fuglafirði, sigur borgarstjórin. Tí verður farið út á Kambsdal, har onkur spennandi ætlan er á veg**

KOMMUNUMÁL
*Edvard Joensen*

**Fuglafirði:** Í Fuglafirði er vøkstur og tilflyting. So stórur er áhugin fyri grundstykkjum, at nú er fult, og neyðugt verður at vísa fólki út á Kambsdal.

Ein útstykking er í gongd norðuri í Stovugerðinum, sigur Sigurd Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði. Har verða eini 15 grundstykki at fáa.

Umframt eru fimm grundstykki tók uppi á Sevdalsvegi. Men líkt er til, at har hava fólk minni hug at búgva, sigur hann. Helst tí, hildið verður, at tað liggur í so ovarlaga.

Eisini hevur kommunan keypt eitt øki upp á 17.000 fermetrar, sum ætlanin er at stykkja út, í Toftabønum. Kommunan hevur í ár sett hálvatriðju milión av til endamálið. Í Toftabønum vænta tey at fáa eini 14 grundstykki burturúr.

Hesar báðar seinastu útstykkingarnar í Fuglafirði, verða eisini tær seinastu yvirhøvur. Stutt og greitt tí, at nú er einki byggilendi eftir inni í Fuglafirði. So er tað Kambadalur, sum eftir er.

Men hóast hesi tilboðini, er tað ikki nokk kortini, sigur Sigurd Simonsen. Tí í løtuni eru yvir 40 umsóknir á bíðilista.

Úti á Kambadali verður arbeitt við eini loysn við tvíhúsum og íbúðum. Kommunan hevur ætlanir um at lata byggja níggju tvíhús á økið millum verandi bústaðarøki og ídnaðarøki á Kambsdali. Hesi skulu vera í ymsum sniðum, er ætlanin. Soleiðis at møguleikar skulu vera hjá fólki at velja, um tey vilja hava heil hús, ella íbúðir av ymsari støðd.

– Væntandi fara vit at fáa 36 búeindir burtur úr hesi ætlanini, sigur borgarstjórin í Fuglafirði, Sigurd Simonsen.

Hann sigur, at fyrireikingarnar eru komnar rættiliga væl ávegis. Allir stovnar, sum eru relevantir, hava sagt gott fyri ætlanini. Tað, sum nú verður bíðað eftir er, hvør skal standa sum byggiharri.

Kommunan vil helst sleppa undan sjálv at sanda sum byggiharri, tí tað fer at ávirka íløgukarmin aðrastaðani, um so verður. Tí verður roynt at finna okkurt felag ella so, sum vil átaka sær at sanda fyri verkætlanini.

Hinvegin er eingin trupulleiki at fáa sjálvt arbeiðið gjørt. Tað er meira enn eitt byggifelag, sum er áhugað, sigur borgarstjórin.



*Á økinum millum bústaðarøkið, sum er, og ídanaðarøkið a Kambsdali, er ætlanini at byggja tvíhus við íbúðum*
*Mynd: Edvard Joensen*



# Vesturstova víðkar



*Tá Vesturstova varð bygd í 1999, varð bara ovara hæddin innrættað og tikin í brúk. Nu verða seks búpláss aftur at gjørd í kjallaranum*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Eldrasambýlið Vesturstova i Fuglafirði fær meira enn eina helvt aftur at verandi búplássum. Kjallarin verður innrættaður til at hýsa seks búfólkum aftur at teimum tíggju, sum frammanunda búgva í húsinum**

SAMBÝLI
*Edvard Joensen*

**Fuglafirði:** Búplássini í eldrasambýlinum Vesturstovu í Fuglafirði fara at økjast við 60 prosentum, tá útbyggingin, sum er í gongd, verður liðug.

Talið á gomlum fólki økist alsamt i Føroyum, og við tí eisini tørvurin á búplássum á ellisheimum og sambýlum.

Eldrasambýlið Vesturstova í Fuglafirði, sum varð tikið í nýtslu í juni mánaða 1999, er longu ov lítið, og gjørd verða nú seks nýggj búpláss aftur at teimum tíggju, sum eru. Tá húsið varð bygt, varð gjørdur møguleiki til hesa útbyggingina, sum longu tá var væntandi.

Sigurd Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði, sigur, at eitt, sum er rættiliga áhugavert við hesum slagi av búplássum, sum Fuglafjarðar Kommuna hevur, er prísurin.

Meðan aðrastaðni verður roknað við, at eitt búpláss á einum ellis- og røktarheimi kostar umleið eina millión, er kostnaðurin fyri hvørt plássið í Vesturstovu góðar 300.000,- krónur.

Tá húsið varð bygt, kostaði tann parturin, sum gjørdur varð tá, umleið tríggjar milliónir krónur til tíggju búplass. Tað, sum nú verður gjørt afturat, fer at kosta umleið tvær milliónir.

Grundina til, at hendan útbyggingin er lutvís dýrari enn fyrsta byggingin var, sigur Sigurd Simonsen vera, at nú verður inntættað í kjallaranum, og tað krevur eina lyftu, so fólkini kunnu ferðast i millum hæddirnar. Eisini er neyðugt, nú fleiri fólk koma at búgva, at hava ventilitatión í húsinum. Tí er hesin prísurin lutfalsliga høgur, sigur hann.

Farið varð undir at innrætta kjallaran i oktober í fjør, og væntandi verður liðugt í mai mánaða, sigur borgarstjórin.

Fólk eru gomul, sum búgva í Vesturstovu. Elsta búfólkið er 101 ár, og meðaldurin er 89 og eitt hálvt ár.

# Uppboðsøla í Fuglafirði



*Í pakkhúsinum heimast á havnarlagnum í Fuglafirði fer nýggja uppboðsølan at halda til*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Ein uppboðsøla kemur nú væntandi aftur at í Eysturoynni. Fuglafjarðar Útróðrarfelag gongur á odda fyri at fáa móttøku og uppboðsølu í Fuglafirði**

UPPBOÐSØLA
*Edvard Joensen*

**Fuglafirði:** Útróðrarmenn í Fuglafirði ætla sær tað høgligari at sleppa av við fiskin. Teir fara at selja á uppboðsølu á bryggjukantinum beint har, sum teir leggja at.

Í reyða pakkhúsinum heimast á havnarlagnum i Fuglafirði, verður í næstum farið undir at innrætta uppboðsøluna. Tað er Fuglafjarðar Útróðrarfelag, sum heviur gingið undna við ætlanini, greiðir borgarstjórin í Fuglafirði frá.

Sigurd Simonsen sigur, at málið var fyri á býráðsfundi í Fulgafirði, og at býráðið tók einmælt undir við ætlanini.

Kommunan eigur hølið á havnarlagnum, sum brúkast skal til endamálið. Tað er eitt pakkhús, sum er 500 fermetrar til víddar. Av hesum er umleið fjórðingurin innrættaður til skrivstovuhøli, og onnur rúm, sum neyðug eru. Í løtuni eru hølini útleigað til goymslubygning hjá Havsbrún, men tann avtalan er uppsøgd.

Fiskamarknaður Føroya á Toftum er við upp á ætlanina, sigur borgarstjórin í Fuglafirði.

Skipað verður fyri ráfiskamóttøku og uppboðssølu á sama hátt sum gjørt verður suðuri í Vági og í Sørvági, sigur hann.

Tað verða sjálvandi ikki bara útróðrarbátarnir, sum kunnu brúka hesa uppboðssøluna, uttan eisini størri før, sum vilja leggja upp í Fuglafirði.